## Katrin í hálvfinaluni

Katrin Olsen hevur róð seg í hálvfinaluna í world-cup kapping í single-sculler

Kappingin verður hildin í Poznan í Pólandi, og er hetta fyrsta ferðin, at Katrin kappast í hesum bátaflokkinum.

Sambært danska róðrarsambandinum, so var enska Laura Ralston favorittur í hesi kapping, men hon megnaði tó ikki at fylgja við Katrin. Saman við eini týskari kvinnu var Katrin allan róðurin á odda, og hon er soleiðis til reiðar at rógva hálvfinalu í dag.

**-mørk**

## Stóri skal venja Køge



Køge hevur tey bæði seinnu kappingárarini talst millum liðini, sum hava stríðst fyri uppflyting til donsku superliguna.

Enskiríkmaðurin, Clive Stapleton, hevur brúkt á leið 10 mió kr. í hesum royndum, men enn hevur hetta ikki givið ynskta úrslitið, og nú er Stapleton ávegis úr felagnum.

Tað merkir tó ikki, at alt er steðgað upp. Leiðslan í felagnum hugsar framvegis frameftir, og nú er avtala gjørd við Henrik Larsen, um at hann skal verða venjari hjá liðnum, sum enn einaferð meddar eftir uppflyting.

**-mørk**

# Tølini siga at Eysturoyingur eigur tørn

**Síðani teir á eystara armi av Skálafjørðinum fingu nýtt 10-mannafar, hava teir vunnið aðru hvørja ferð í heimasjógvi**

KAPPRÓÐUR

*Jóannes Hansen*

Triði FM kappróðurin verður á Eystanstevnu í morgin. Róð verður á Skálafjørðinum, sum verður roknaður at vera eitt tað besta og kanska tað allar besta róðrarøkið av øllum. Økið er bæði stórt og vítt, og tað er eingin trupulleiki at rógva á øllum trimum teinunum – á 1000, 1500 og 2000 metrum.

Spenningurin er stórur. Á Sundalagsstevnuni síðsta leygardag vóru úrslitini í fleiri róðrum øðrvísi, enn tey vóru á Norðoyastevnu. Í morgin fæst ivaleyst góð ábending um, um tað nú eru ávísir bátar og manningar, sum mugu roknast at vera greiðir favorittar at vinna FM.

Fyri mong var mest óvæntaða úrslitið á Kollafirði, at Eysturoyingur noyddist at lúta fyri Klaksvíkingi í kappingini millum 10-mannaførini. Klaksvíkingar vunnu sannførandi sigur.

Spurningurin er so, um Eysturoyingurin fer at megna at svara aftur í heimasjógvi, ella um Klaksvíkingur aftur fer at verða fyrstur á mál. Úrslitini í tveimum teimum fyrstu kappingunum hava ikki bent á, at talan skal verða um annan vinnara enn Eysturoying ella Klaksvíking. Leygardagin kappaðust hesir báðir bátarnir púra fyri seg sjálvar.

Klaksvíkingar hava einki serlig róðrarhagtøl at vísa á. Í 2002 luttóku teir fyrstu ferð við nýggjum 10-mannafari. Tá var besta úrslitið hjá teimum á Eystanstevnu, har teir endaðu á øðrum plássi. Í sera spennandi róðri lá Eysturoyingur á Klaksvíkingi við knappliga tveimum sekundum.

Næstsíðsta ferðin, at Klaksvíkingur hevur verið við í kappingini um oddasessin á Eystanstevnu var í 1970. Tá var hann fremstur á veg móti málinum, men á sjálvari málstrikuni tók Skálabáturin Klaksvíking.



*Hagtølini seinastu árini siga, at Eysturoyingur vinnur aðru hvørja ferð, tá ið hann rør í heimasjógvi*

**Tølini**

Hagtølini seinastu árini siga, at Eysturoyingur vinnur aðru hvørja ferð, tá ið hann rør í heimasjógvi. FM kapproður er á Eystanstevnu annað hvørt ár. Fyrsta ferðin, at nýggi Eysturoyingur, ið Sámal Hansen, sum nú er formaður í Kappróðrarfelagnum NSÍ, hevði smíðað, luttók í kappingini, var í 1998. Tá var hann fyrstur á mál.

Í 2000 vann Nólsoyingur. Tá var Eysturoyingur nummar fýra. Í 2002 vann Eysturoyingur. Klaksvíkingur var næstfremstur. Í fyrraárið – í 2004 – var Havnarbáturin fremstur á Eystanstevnu. Eysturoyingur var næstfremstur.

So er spurningurin, hvussu tað fer at hilnast í morgin. Hagtølini kundu bent á, at Eysturoyingur eigur tørn av vinna.

Klaksvíkingur og mongu viðhaldsfólkini, sum í morgin fara at fylgja Klaksvíkingi undir Leirvíksfirði, fara neyvan at hugsa stórvegis um søguligu gongdina. Tað ræður heldur um styrkina, kraftina, taktisku tilvitanina og tekniska snildið. Í morgin fæst at síggja, hvør verður stinnastur í samantalda úrslitinum av øllum hesum, og hvør tað verður, sum fer at hava marginalarnar á sínari síðu.

Í 1996, 1994 og 1992 vann Skálabáturin á Eystanstevnu. Eysturoyingur luttók ikki í 1996 og í 1994. Nólsoyingur vann bæði í 1990 og í 1988. Eysturoyingur luttók ikki í 1990. Vestmenningur vann í 1986. Heldur ikki ta ferðina var Eysturoyingur mannaður.

## Startrøðin á eystanstevnu

50 bátsmanningar fara leygardagin at rógva triðja FM-róðurin í ár. Hartil verður talan eisini um barnaróður við tilsamans 10 bátsmanningum.

Startøðin til róðrarnar er hendan:

**Barnaróður, dreingir**
1 Dúgvan
2 Sílið
3 Havfrúgvin
4 Jallurin
4 Blikur

**Barnaróður, gentur**
1 Royndin Fríða
2 Falkur
3 Drekin
4 Tekla
5 Strípan

**5-mannafør, dreingir**
1 Blikur
2 Sílið
3 Havfrúgvin
4 Jallurin
5 Ritan
6 Kollur
7 Strípan
8 Drekin

**6-mannafør kvinnur**
1 Jarnbardur
2 Riddarin
3 Lómur
4 Smyril
5 Hvessingur

**5-mannafør, gentur**
1 Firvaldur
2 Ørnin
3 Blikur G
4 Havfrúgvin
5 Frúgvin
6 Drekin
7 Hvassi G
8 Sílið

**5-mannafør, kvinnur**
1 Báran
2 Drekin
3 Junkarin
4 Sílið
5 Ørnin
6 Jallurin
7 Ritan
8 Tjaldrið
9 Blikur

**6-mannafør, menn**
1 Kollfirðingur
2 Páll Fangi
3 Hósvíkingur
4 Gongurólvur
5 Sundabáturin
6 Sølmundur
7 Jarnbardur
8 Smyril
9 Lómur
10 Víkingur

**8-mannafør**
1 Nevið Reyða
2 Ørvur
3 Knørrur
4 Argjabáturin

**10-mannafør**
1 Nólsoyingur
2 Skálabáturin
3 Eysturoyingur
4 Klaksvíkingur
5 Havnarbáturin
6 Vestmenningur

# FINNIÐ BÓLTIN

Saman við Atlantic Airways lutar Sosialurin í ár ikki færri enn 13 flogferðaseðlar á rutunetinum hjá Atlantic. Ein vinnari verður hvørt umfarið í Formula-deildini

Møguleikarnir fyri flogferðum úr Føroyum hava ongan tíð verið so stórir, sum teir verða tað í ár. Við fimm flogførum í støðugari flúgving eigur Atlantic Airways sín stóra lut í øktu valmøguleikunum, og nú kanst tú saman við Sosialinum og Atlantic verða partur í nøkrum av mongu fráferðunum.

Eftir hvørt umfarið í Formula-deildini verður ein mynd at síggja her í blaðnum, har vit hava »sletta« bóltin úr myndini. Uppgávan hjá lesaranum er so at gita, hvar hesin bólturin eigur at vera.

Við at senda SMS-boð á 1441 ber til hjá lesarunum at vera við í kappingini, har Atlantic Airways hevur eina flogferð tøka eftir annaðhvørt av teimum 27 umførunum í Formula-deildini.

Heldur tú, at bólturin er í teigi 1, skal teksturin í SMS-boðnum vera »hvar 1«. Soleiðis skal hvørt boðið bara innihalda orðið »hvar« og so nummarið á teiginum, har tú heldur bólturin eigur at vera.

*Kostnaðurin fyri at senda boðini er 5 krónur umframt vanligan SMS-takst.*

ATLANTIC AIRWAYS






***Hvar er bólturin?***

Hvar heldur tú, at bólturin er? Við at senda eini SMS-boð til 1441 kanst tú vera við í lutakastinum um eina ferð á rutunetinum hjá Atlantic Airways. Skrivað hvar og so nummarið á teiginum, har tú heldur bóltin vera.